## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin minni vindur av ymsum ættum og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi og vestri, turt og sólglottar. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, sunnudagin hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.

# Sofus á Hafnia

**Listamálarin Sofus Poulsen sýnir í hesum døgum 18 akvarellir fram á Hotel Hafnia í Havn**

**FRAMSÝNING**
*Jákup Mørk*



*Talan er fyrst og fremst um náttúrulýsingar, og í so máta er Sofus ikki broyttur stórvegis. Tað sermerkta hesaferð er tó, at talan í øllum 18 førunum er um gomul motiv, sum listarmaðurin nú hevur givið nýggja viðgerð* Mynd: Jens Kristian Vang

Talan er um akvarellir, sum allar ímynda ymisk motiv, sum Sofus áður hevur málað á leið seinastu tíggju árini. Gamlir málningar í nýggjum hami, so at siga. Sjálvur sigur listarmaðurin, at hetta fyrst og fremst eru motivir, sum honum hevur dámað væl, og sum hann tískil hevur givið nýggja viðgerð, so at siga.

– Samstundis er tað sjálvandi so, at tá eg seinni havi hugt at teimum málningunum, so vil tað altíð vera okkurt, sum tú kundi hugsað tær øðrvísi. So eg vóni, at við hesum havi eg gjørt nakrar myndir, ið eru betri enn tær, sum eg áður havi gjørt.

Talan er fyri tað mesta um náttúrumyndir, sum eru við á framsýningini, og soleiðis munnu fólk eisini flest kenna listina hjá Sofusi. Lýsingar av føroysku náttúruni, har listamaðurin onkursvegna roynir at krúpa inn í serstaka føroyska huglagið, fyri á tann hátt at gerast ein boðberi til móttakaran.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 16 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 26 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 22 |
| New York | 19 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 977 hPa. við Ísland fer í útsynning og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 980 hPa. við Vestur-Noreg fer í landsynning.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland –ein leivd av »IVAN«–fer í landnyrðing eystan, skamt sunnan fyri Føroyar og hevur hósdagin nógvan høgættavind við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/09 kl. 06⁰⁰–21/09. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm –mált frá 20/09 kl. 06 ⁰⁰–21/09 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í september: 164,4 mm

GEVIÐ BLÓÐ
Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept.: Fyrra kvarter
22. sept.: Mánin næstur jørðini
28. sept.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. sep | 01.28 | 14.10 | 00.28 | 13.10 | 00.43 | 13.25 | 03.28 | 16.10 | 04.28 | 17.10 | — | 12.25 | 11.25 | — | 01.43 | 14.25 | 02.43 | 15.25 | 01.13 | 13.55 | 02.28 | 15.10 |
| 23. sep | 02.52 | 15.21 | 01.52 | 14.21 | 02.07 | 14.36 | 04.52 | 17.21 | 05.52 | 18.21 | 01.07 | 13.36 | 00.07 | 12.36 | 03.07 | 15.36 | 04.07 | 16.36 | 02.37 | 15.06 | 03.52 | 16.21 |
| 24. sep | 03.51 | 16.19 | 02.51 | 15.19 | 03.06 | 15.34 | 05.51 | 18.19 | 06.51 | 19.19 | 02.06 | 14.34 | 01.06 | 13.34 | 04.06 | 16.34 | 05.06 | 17.34 | 03.36 | 16.04 | 04.51 | 17.19 |
| 25. sep | 04.47 | 17.13 | 03.47 | 16.13 | 04.02 | 16.28 | 06.47 | 19.13 | 07.47 | 20.13 | 03.02 | 15.28 | 02.02 | 14.28 | 05.02 | 17.28 | 06.02 | 18.28 | 04.32 | 16.58 | 05.47 | 18.13 |

5 707265 100036 >